# Thor byggir skip fyri 75 milliónir í Føroyum



**Um eitt ár ella so hevur pf. Thor í Hósvík eitt skraddaraseymað veitingarskip, sum Tórshavnar Skipasmiðja skal byggja. Skipið er 55 metrar langt, og ein av høvuðsorsøkunum til, at sáttmálin gjørdist veruleiki er, at skrokkurin verður smíðaður av útlendskum undirveitara í Føroyum**

SKIPASMÍÐ
*Orð & mynd*
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Klokkan trý korter til tíggju í morgun hevði pf. Thor bjóðað til tíðindafund og í innbjóðingini stóð, at hetta fór at snúgva seg um ein stóran byggisáttmála. Og aftan á fundin vóru øll samd, at talan veruliga var um ein stóran byggisáttmála.

Um gott og væl eitt ár fær Thor í Hósvík 55 metrar langt veitingarskip, eitt sonevnt support/chase skip, sum millum annað skal sigla útgerð til seismikkskip, sum sjáldan eru at síggja við føroyskan kaikant.

Á Thor eru tey errin av at kunna siga, at alt arbeiðið verður gjørt í Føroyum. Men hetta merkir tó ikki, at alt skipið verður smíðað av føroyskum hondum burturav. Tórshavnar Skipasmiðja stendur fyri byggingini, og hevur latið ein útlendskan undirveitara gera skrokkin á skipasmiðjuni á Skála.

- Stálskipasmíð er ikki til longur á okkara leiðum, og tí er tað gleðiligt, at vit hava fingið avtalu í lag við føroyskar handverkarar um, at ein útlendskur undirveitari sleppur at smíða skrokkin í Føroyum, segði stjórin á Tórshavnar Skipasmiðju, Gunnar Mohr, millum annað á tíðindafundinum í morgun.

Tá spurt varð, hvør hesin útlendski undirveitarin er, segði Gunnar Mohr, at tann avtalan er ikki endaliga komin upp á pláss, men at hann kunna siga so mikið sum, at tað var talan um eina pólska skipasmiðju, sum skuldi taka sær av arbeiðinum:

- Vit hava samband við fleiri í Pólandi, men hava ikki vilja gjørt nakra endaliga avtalu við nakran, fyrr enn dagurin í dag var farin aftur um bak, og henda avtalan var komin upp á pláss, greiddi Gunnar Mohr frá.

Seinastu skipaskrokkarnir, sum vórðu smíðaðir í Føroyum vóru teir tríggir 24 metra langu politibátarnir, sum grønlendingar keyptu í 1998 og 1999. Tá var tað Tórshavnar Skipasmiðja, sum gjørdi arbeiðið, men sei-ast skipasmiðjan á Skála smíðaði nakran skrokk var í 1989 og tað var skrokkurin á Hagadrangi.

### Ongin trupulleiki við fakfelagið

Meðan arbeiðið at smíða skrokkin stendur uppá, koma millum 25 og 60 útlendskir handverkarar at vera á skipasmiðjuni. Men áðrenn tað kom so langt, at tað varð avgjørt, at útlendsk arbeiðsmegi skuldi átaka sær hesa uppgávuna, so setti Tórshavnar Skipasmiðja seg í samband við Landsfelag Handverkaranna, og tað er nakað Daniel Pauli Djurhuus, formaður í felagnum, fegnast um:

- Tað gleðir okkum, at vinnan spyr fakfeløgini fyrst, og avtalan, vit nú hava gjørt, er altjóðagerð í verki, segði Daniel Pauli Djurhuus og vísti á, at vit ikki liva av staðbundnum prinsippum, men mugu fyrihalda okkum til altjóðagerðina og tey krøv hon setir. Hann segði eisini, at tað var teirra hugsan, at hetta var munandi betri, enn at øll skipasmiðjuvinna í Føroyum fór fyri bakka, og kallaði hann avtaluna eitt nýbrot í øllum Norðurevropa.

### Fleiri í væntu

Skipið sum nú skal byggjast kemur ætlandi at kosta 75 milliónir krónur. Hjá Thor verður ásannað, at tað hevði verið bíligari at bygt skipið í eitt nú Kina ella Spania, men at teir meta, at tað í síðsta enda fer at loysa seg at byggja her á landi.

- Vit vita, at norðurlendska góðskan er tann besta í heiminum, og at føroyskt skipasmíð er kent fyri at vera gott. Við at byggja her eru vit vísir í, at vit fáa tí røttu, skræddaraseymaðu loysnina samstundis, staðfesti stjórin á pf. Thor, Hans Andreas Joensen, stutt áðrenn sáttmálin varð undirskrivaður.

Hans Andreas Joensen segði eisini, at um tað vísti seg, at henda verkætlan fer at eydnast væl, so kunnu vit gott rokna við, at Thor fer at byggja fleiri skip á henda hátt.

Ta verður í heyst, at farið verður undir at smíða nýggja veitingarskipið á Skála Skipasmiðju. Samlaði kostnaðurin kemur at vera 75.165.000 krónir, og gongst sum ætlað verður skipið latið Thor tann 15. november 2007.




# »Dúgvan« eitur nú »Sal Rei«




*»Sal Rei« er nýggja navnið hjá »Dúgvuni«, sum nú fer í sigling í Grønahøvdaoyggjunum.*

**Strandfaraskipið »Dúgvan«, sum Strandfaraskip Landsins í síðsta mánað seldu einum flutningfelag úr Grønahøvdaoyggjunum (Cap Verde), hevur nú fingið navnið »Sal Rei«. Skipið stendur á bedingini hjá Tórshavnar Skipasmiðju, har tað verður gjørt klárt til sigling**

SKIPASØLA
*Eirikur Lindenskov*

Tað er flutningsfyritøkan S. T. M. Lines úr Grønhøvdaoyggjunum, sum keypti Dúgvuna fyri 300.000 evrur, svarandi til 2,2 milliónir krónur.

S. T. M Lines rekur innanoyggjasigling á Grønhøvdaoyggjunum og ætlar at nýta Dúgvuna til at røkja eina av hesum farleiðum í framtíðini.

Ábøtur verða nú gjørdar á Dúgvuna á Tórshavnar Skipasmiðju, eitt nú verður bógportrið sveisað aftur, áðrenn kós verður sett móti Grønhøvdaoyggjunum.